UTTAN ÚR HEIMI

# Bygdin hvarv undir skriðuni



*Amerikanskir hermenn hjálpa myndugleikunum í Filipsoygggjunum at leita eftir fólki í bygdini Guinsaugon, sum hvarv undir einari skriðu í vikuskiftinum. Umleið 1.800 fólk búðu í bygdini, og vónirnar um at finna nakran á lívi eru smáar*

# Søgumaður kann fáa 10 árafongsul

**Bretski søgumaðurin David Irving heldur uppá, at týskararnir beindu ikki fyri jødum ella øðrum undir seinna heimsbardaga. Tað kann kosta honum drúgva fongsulsrevsing**

RÆTTARMÁL

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Tann 67 ára gamli David Irving hevur sitið í varðhaldi í Eysturríki síðani 11. november í fjør, tá eysturríkska løgreglan tók hann.

Ákæruvaldið í Wien hevur ákært bretska søgumannin í sambandi við tveir fyrilestrar, sum hann helt í Eysturríki fyri seytjan árum síðani. Tá segði hann millum annað, at tað vóru eingi gasskømur í Auschwitz undir seinna heimsbardaga. Tað er brot á eysturríkska lóg, tí sambært henni er tað bannað av avnokta, at nazistarnir framdu fólkamorð. Verður David Irving dømdur sekur, kann hann fáa upp í tíggju ára fongsul.

Rysturríksku fjølmiðlarnir hava heft seg við, at bretski søgumaðurin var á veg á eina veitslu hjá tí sera høgrasinnaða studentafelagsskapinum Olympia í Wien, tá hann bleiv tikin.

Søgupsofessarin Fritz Plasser sigur við DPA, at rættarmálið ímóti David Irving hevur stóran týdning í Eysturríki, sum roynir at sannføra Vesturheimin um, at landið er fullkomoliga broytt síðani nazitíðina.

# Mark sett millum Grønland og Svalbard

**Danmark og Noreg skrivaðu í gjár undir semju um markið millum Grønland og Svalbard**

MARK

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Tað vóru teir báðir uttanríkisráðharrarnir, Per Stig Møller og Jonas Gahr Støre, sum skrivaðu undir semjuna í Keypmannahavn.

Semjan umfatar eitt landgrunna- og havøki, sum er 150.000 ferkilometrar til støddar, sum partarnir samdust um at býta sínamillum eftir miðlinjuni. Sambært Aftenposten hava samráðingarnar gingið sera væl. Soleiðis hevur tað ikki verið altíð, tá danir og norðmenn hava tingast um yvirvaldsrætt og mark. Í 1933 vann Danmark stríðið við Noreg um yvirvaldsrættin í Grønlandi, men í 1993 helt altjóða dómstólurin við Noregi, tá londini stríddust um leiðina millum Grønland og Jan Mayen.

Hjá norðmonnum er tann stóri spurningurin, um semjan við danir kann fáa ávirkan á spurningin um, hvussu Barentshavið skal býtast ímillum Noreg og Russland, sjálvt um munur er á hesum báðum málunum. Í síðstu viku var norski uttanríkisráðharrin í Moskva, og í hesari vikuni er eitt umboð fyri uttanríkisráðið har og tosar við russar. Tosar er tað rætta orðið, tí sambært norskum fjølmiðlum er ikki talan um veruligar samráðingar.

# Tiknir 15 ár seinni

Seinasta fríggjadag tók løgreglan í amerikanska statinum New Mexico brøðurnar Geoffrey og Gregory Rose, sum myndugleikarnir hava leitað eftir síðani 1991.

Teir báðir vórðu skuldsettir fyri rúsevnahandil í statinum Kansas fyri 15 árum síðani, men ikki fyrr enn nú koma teir fyri rættin. Tá løgreglan rannsakaði hús teirra í Kansas í 1991, funnu løgreglumenninir fleiri vápn og eina rúgvu av spreingievni, og hildið verður, at brøðurnir mundu vera ímillum teir størstu rúsevnahandilsmenninar har tá.

Bæði løgreglan og FBI hava sóknast eftir brøðrunum síðani, men ikki fyrr enn fríggjadagin vórðu teir funnir. Løgreglan veit ikki, hvussu leingi teir hava verið í New Mexico, ella hvar teir hava verið øll hesi árini. Í dag eru Groffrey og Gregory Rose ávikavist 62 og 50 ára gamlir.

## Kunnu søkja at tangaskipum

Uppreistrarmenn í Nigeria hótta nú við at skjóta eftir útlendskum tangaskipum, sum koma til Nigeria eftir olju, skrivar AP.

- Vit ætla at søkja at skipunum við rakettum, sigur Efie Alari, sum er talsmaður hjá uppreistrarmonnunum. Hann sigur, at málið hjá uppreistrarmonnunum er at geva tí nigeriska fólkinum størri ágóða av oljuinntøkunum, tí sum er fáa summi nógv meiri enn onnur. Sambært AP hevur hóttanin um at søkja at tangaskipum havt við sær, at oljuútflutningurin hjá Nigeria er minkaður umleið 20 prosent, og fleiri bera ótta fyri, at tað fer at ávirka oljuprísin.

Uppreistrarmenninir hava fleiri ferðir rænt og burturflutt fólk, sum arbeiða í oljuvinnuni. Herfyri vórðu níggju útlendingar, sum arbeiddu í oljuvinnuni, burturfluttir.

## Persson brókaleysur



Ein tekning av svenska forsætisráðharranum, Göran Persson, hevur elvt til nógv orðaskifti í Svøríki. Á tekningin er forsætisráðharrin avmyndaður við brókunum niðri á knøunum, samstundis sum hann er bendur inn yvir eitt borð í einari støðu, sum sambært blaðnum Expressen minnir um eina samkynda samlegu.

Gunder Norell, sum hevur teknað myndina, sigur við blaðið, at tað er upp til hvønn einstakan at ímynda sær, hvør er á myndini, men kortini er eingin ivi um, at tann brókaleysi maðurin er Göran Persson. Undir aðrari liðini stendur kona hansara, Anitra Steen, og aftan fyri forsætisráðharran standa millum annað George Bush, forseti, og Bosse Ringholm, eins og standa teir í bíðirøð, skrivar Expressen.

Hvørki Götan Persson ella kona hansara vilja gera viðmerkingar til tekningina, sum varð sýnd fram á einari framsýning. Sjálvur ásannar Gunder Norell, at hann kanska er farin um mark, men hann heldur uppá, at ætlan hansara var ikki at niðra nakran ávísan persón.

## Tekningarnar geva úrslit

Í Danmark hava veljarakanningar víst, at Danski Fólkaflokkurin hevur fingið nógv burtur úr stríðnum um tekningarnar av Muhammed profeti. Var val í dag, hevði flokkurin fingið so nógv umboð á ting, at hann hevði kunnað skipað stjórn saman við Vinstra.

Nú vísir ein kanning, at tekningarnar hava eisini ávirkað norðmenn, og at har hevði Framburðsflokkurin fingið eitt rimmar úrslit, hevði stórtingsval verið nú. Eftir kanningini hevði flokkurin fingið 31 prosent av atkvøðunum, sum er 5,9 prosentstig meiri enn á valinum í fjør. Tað hevði gjørt hann hálva triðju ferðir størri enn tann gamla borgarliga leiðaraflokkin Høgra, og tað er eisini haðani, framgongdin hjá Framburðsflokkinum kemur.

Siv Jensen, næstformaður í Framburðsflokkinum, heldur ikki, at tað eru tekningarnar av Muhammed profeti, sum hava givið flokkinum so nógvar atkvøður afturat, men heldur tann miðvísi politikkurin, sum flokkurin hevur rikið í mong ár. Teir politisku eygleiðararnir eru ikki samdir við.